Eiðis kommuna

## Leiðari til barnagarðin á Eiði

Barnagarðurin Korndalsgarður søkir eftir leiðara at starvast fulla tíð. Byrja 01.03.2010 ella skjótast til-ber.

**Setanarviðurskifti**
Starvið verður sett sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya.

**Umsókn**
Umsókn við avrit av prógvi og møguligum viðmælum skulu vera hjá Eiðis Kommunu, Brekkuvegur 22, 470 Eiði, í seinasta lagi 15.02.2010

**Nærri fæst at vita**
Um starvið við at venda sær til Rólant Poulsen, Borgarstjóra, telefon 213312.

## Aðalfundur hjá Vága Bjargingarfelag

Sunnudagin, hin 7. februar 2010 kl. 15.00, verður aðalfundur hjá Vága Bjargingarfelag á brandstøðini í Miðvági.

Skrá sambært lóg felagsins.

Øll eru vælkomin, møtið fjølment, nýggir limir kunnu tekna seg.

*Í Sandavági, hin 29. januar 2010*

***Sofía Jacobsen, formaður.***

www

## Tryggari Internetdagur

tann 9. februar 2010

Miðlaráðið · Dátueftirlitið · Barnabati



Les Sosialin so ert tú við

FAROE LAW

## Ognarlutir til sølu

Vegna trotabúgvið Sp/f Handilskjarnin, SKS 3-324/2009, verða hesir ognarlutir lýstir til sølu um hóskandi boð fæst:

**Innbúgv**
Alt innbúgv, sum hoyrdi til handlarnar Deres, Bianco og Factory Outlet, umframt skrivstovuinnbúgv og ein Citroen Jumpy Combi 2.0 HDI, vøruvognur frá 2006.

**Vørugoymsla**
Øll vørugoymslan, sum hoyrdi til Deres, Bianco og Factory Outlet.

Til ber at síggja innbúgvið, vørugoymsluna v.m. eftir nærri avtalu við undirritaða.

Trotabúgvið tilskilar sær rættin at selja innbúgvið og vørugoymsluna hvør sær, samlað ella í smálutum.

Boð skulu verða búnum í hendi í seinasta lagi mánadagin 8. februar 2010, kl. 12.00.

**Áhugað kunnu venda sær til:**
Jens Wang, advokat, Faroe Law, Tróndargøta 19, Postboks 158, FO-110 Tórshavn, tlf. 35 99 00, fax 35 99 01, jwa@faroe-law.fo

**Advokatpartafelagið Faroe Law**
Tróndargøta 19 · Postboks 158 · FO-110 Tórsahvn
Tlf. 35 99 00 · fax 35 99 01

## FIRMAFÓTBÓLTUR

**Leygardagin 13. februarskipar Fótbóltsfelagið Giza í samstarv við Reyni Service fyri "Toyota Cup" í innandura firmafótbóltið í Hoyvíkshøllini.**

Nr. 1, 2 & 3 fáa steyp til ognar, haraftrat fær vinnarin eitt gávukort á kr. 2000,00 til Mica.

Kostnaðurin fyri luttøku er kr. 500,00 pr. lið. Loyvt er at hava 1 leikara úr Vodafonedeilduni, 1. Deild og 2. Deild. 4 leikararir eru á hvørjum liðið. 1 Skiftisleikari kann vera á liðnum.

Tilmelding fer fram á tlf.: 737403 og 737405

ella t-post: giza@email.fo.

**Seinasta freist: Hósdagin 11. februar kl. 20.00**



Klokkan · mica · Reyni Service




## Hevur tú hund?

**So burdi tú eisini havt SKYTTENs SPECIAL**

**SPECIAL – 20 kg kr. 450,-**

Turrfóður til vaksnar hundar. Við omega-3 og omega-6 feittsýrum, ið geva blankan og skínandi pels. Sera gott til hundar við húð- og pelstrupulleikum og til eldri hundar.

**Bílegging á kho@olivant.fo ella tel. 22 12 40**

# LEIÐARI
## til Føroya Barnaheim

**Søkt verður eftir leiðara til Føroya Barnaheim at byrja 1. mars 2010 ella skjótast tilber.**

Føroya Barnaheim er sjálvsognarstovnur. Stovnurin hevur í dag eina deild, Ungdómsdeildina, sum kann hýsa 6 børnum. Harafturat er eitt bráfeingispláss. Deildin hevur 8,5 fulltíðarstørv. Ætlandi verða broytingar gjørdar í næstum, sum kunnu hava við sær økt barnatal og tal á starvsfólki.

Endamálið við arbeiðinum á Ungdómsdeildini er fyrst og fremst at geva børnunum/teimum ungu umsorgan og tryggleika, samstundis sum dentur verður lagdur á at vísa á týdningin av gevandi og mennandi samveru. Hetta verður gjørt við einum skipaðum og viðkomandi gerandisdegi við áhuga og nærleika, við serligum átøkum, og ikki minst við reglurligum samrøðum og øðrum uppbyggjandi samskifti. Tað er greitt mál hjá Ungdómsdeildini at hava gott samstarv við foreldur og játtandi myndugleikar, umframt aðrar viðkomandi starvsbólkar og stovnar.

Leiðarin hevur fakligu, fyrsitingarligu og fíggjarligu ábyrgdina av stovninum.

Dentur verður lagdur á, at tann, ið settur verður, hevur góð leiðara- og samstarvsevni, hevur áræði og dugir at skapa eitt mennandi umhvørvi fyri brúkarar og starvsfólk.

Til starvið krevst útbúgving sum námsfrøðingur ella onnur líknandi útbúgving. Dentur verður lagdur á starvsroyndir.

Starvið verður lønt smb. sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi fakfelag.

Meira fæst at vita um starvið við at venda sær til Fríðu Patursson, stýrisfm. á tlf. 224969.

Skrivlig umsókn við prógvi, viðmælum v.m. skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi tann 18. februar 2010.

**Føroya Barnaheim, stýrið**
Pedda við Steingøta 10
FO-100 Tórshavn




**Ja takk!** Eg ynski at tekna meg sum haldara av Sosialinum, og fái blaðið borið út 5 ferðir um vikuna

**Tekna teg sum haldara nú fyri einans**
**495,- um ársfjórðingin**
**Sparið 560,- í mun til leysasølu!**

Navn:

Bústaður:

Bygd / býur:

Telefon:

Undirskrift:

**Send lepan til:**
Sosialurin
Boks 76
FO-110 Tórshavn